Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2374, P/F Driftin, 510 Gøta.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Martin Asmund Sofus Hammer Gøte, 510 Gøta og Per Anton Anfinnur Huusgaard, 513 Syðrugøta.
Innkomin í nevndina: Símun Mittún, 600 Saltangará og Sylverius Hansen, 520 Leirvík.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1845, P/F Tøting, 510 Gøta.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Jákup Christian Mørkøre, Postbox 3302, 187 Hvítanes (formaður) og Kristoffer Suni Laksá, 510 Gøta.
Innkomin í nevndina: Líggjas Joensen, Undir Heygnum 7, 100 Tórshavn (formaður) og Ólavur Gregersen, J. Dahlsgøta 10, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Ólavur Gregersen, J. Dahlsgøta 10, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Hallbera Ólavsdóttir Kristiansen, 510 Gøta.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 29, P/F Thomas Dam & Co, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 18.04.2001
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 06.12.2001 er nú gjøgnumført.
Kapitalur: Kr. 5.000.000,00.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2377, P/F Selberg, 380 Sørvágur.

Viðtøkur broyttar: 25.10.2001
Nýtt navn: Sp/f Selberg
Nýggj adressa: Box 1229, 110 Tórshavn
Nýggjur heimstaður: Tórshavnar Kommuna
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 15.06.2001 er nú gjøgnumført.
Kapitalur: Kr. 200.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Bjarti Mohr, V. U. Hammershaimbsgøta 36, 100 Tórshavn (formaður), Jónsvein Knudsen, á Heygum, 600 Saltangará og Jón Niclas Johannesen, 655 Nes, Eysturoy.
Stjórn:
Farin frá sum stóri: Jónsvein Knudsen, á Heygum, 600 Saltangará.
Innkomin sum stjóri: Bjarti Mohr, V. U. Hammershaimbsgøta 36, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2452, P/F Faroe Seafood, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Høgni Hansen, Livulág 1, 100 Tórshavn (formaður), Kaj Jákup Súni Jacobsen, Tórugøta 27, 100 Tórshavn og Jens Kári Vilhelm, Gróthúsvegur 19, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Óli Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík (formaður), Bergur í Garði, Haraldstrød 8, 100 Tórshavn (næstformaður), Sofus Poulsen, Agusteinsvegur 1, 188 Hoyvík, Símun Mittún, Grannatún, 600 Saltangará og Petur Even Djurhuus, N. Mohrsgøta 7, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2216, P/F Føroya Fiskavirking, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Bergur í Garði, Haraldstrød 8A, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina sum formaður: Óli Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík.
Farin frá sum næstformaður: Símun Mittún, 600 Saltangará.
Innkomin sum næstformaður: Bergur í Garði, Haraldstrød 8A, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Jens Josefsen, Sømandshvile Park 23, DK-2960 Rungsted Kyst.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3217, Sp/f Inn, 460 Norðskáli.

Viðtøkur broyttar: 05.11.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 200.000,00 til kr. 280.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 200.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 12. desember 2001

Kristin Balle

KPMG

Starvsfólk
til skatta- og avgjaldsøkið

Virksemi okkara innan skatta- og avgjaldsøkið er støðugt vaksandi. Vit hava tí brúk fyri einum starvsfólki afturat, sum burturav skal arbeiða við skatta- og avgjaldsspurningum.

Starvslýsing
Arbeiðið fevnir um ráðgeving og tænastur innan skatta- og avgjaldsøkið. Innan **skattaøkið** fevna uppgávurnar um ymiskar skattligar spurningar viðvíkjandi

- persónum
- feløgum
- grunnum
- deyðsbúgvum v.m.

bæði sæð í mun til innanhýsis føroyskar skattareglur og í mun til tær tvískattaavtalur, sum Føroyar hava við onnur lond.

Á **avgjaldsøkinum** er serliga talan um viðgerð av ymsum spurningum um meirvirðisgjald.

Tær einstøku uppgávurnar verða vanliga loystar í samarbeiði við grannskoðararnar.

Fleiri av uppgávunum verða loystar í samstarvi við KPMG skrivstovur og aðrar grannskoðarafyritøkur í øðrum londum, serstakliga í Danmark, Íslandi og Noregi.

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv, har rætti umsøkjarin hevur høvi at seta sín dám á starvið.

Umsøkjarin
Tann, ið settur verður, skal hava

- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- viðkomandi arbeiðsroyndir
- lætt við at samstarva
- evni at samskifta í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum

Roknað verður við at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 15. desember 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

KPMG

Vit eru 25 starvsfólk, herav 2 statsaut. revisorar, 3 cand.merc.aud., fleiri við HD og á veg til HD og cand.merc.aud., og ein við serroyndum innan edv.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f, sum er føroysk ogn burturav, er limur í KPMG International, eitt av heimsins størstu samtøkum av grannskoðarafyritøkum við meira enn 100.000 starvsfólkum til samans.

KPMG veitir tænastur innan grannskoðan, roknskap, fíggjarstýring, skatt og mvg, og aðrar serligar tænastur á hægsta góðskustigi.

Endamálið við KPMG International er, at kundar hjá KPMG í gjøgnum samstarv millum grannskoðarafyritøkur kunnu fáa somu tænastur og somu høgu góðsku um allan heimin. Limaskapur okkara í KPMG ger eisini, at bæði vit og kundar okkara kunnu fáa beinleiðis samband við serdeildir í stórum útlendskum grannskoðarafyritøkum.

KPMG í Føroyum hevur ein góðan og breiðan kundaskara við bæði stórum og smáum kundum innan handil, ídnað, fíggjarstovnar, kommunur og stovnar undir landinum.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

Sosialurin

TILTØK

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Kristnastova
Birmavej 36, København S,
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fællershuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyskt møti í Ålborg
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang,
Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Vika 50 – 12. desember
Vinnaratøl: **07 - 17 - 22 - 25 - 27 - 45**

Eykatøl: **11 - 21**

6 vinnaratøl:	**1.216.440,- kr.**
5 vinnarat.+eykatøl	**64.546,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.549,- kr.**
4 vinnaratøl:	**105,- kr.**
3 vinnaratøl:	**35,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VALUTAKURSIR

		12.12.01	Ultimo november
USA	**Dollarar**	833,3200	839,8100
Bretland	**Pund**	1201,0000	1195,0500
Týskland	**Markur**	380,7800	380,4800
Svoríki	**Króna**	79,2200	78,6100
Noreg	**Króna**	92,9000	93,6200
Frakland	**Frankur**	113,5300	113,4500
Belgia	**Frankur**	18,4620	18,4470
Sveits	**Frankur**	504,9100	505,4700
Holland	**Gyllin**	337,9500	337,6900
Italia	**Liri**	0,3846	0,3843
Finnland	**Markur**	125,2600	125,1600
Ísland	**Króna**	7,8600	7,8100
Eysturríki	**Skillingur**	54,1220	54,0800
Spania	**Pesetas**	4,4760	4,4720
Portugal	**Escudos**	3,7150	3,7120
Kanada	**Dollari**	531,8800	532,0000
Grikkaland	**Drakmur**	2,1860	2,1840
Japan	**Yen**	6,6064	6,7756
Írland	**Pund**	945,6200	944,8900
	Evra	744,7400	744,1600

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ



Vinnari:

Tomasia Njálsdóttir
850 Hvalba

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: TONGLATARIN

T	E	R	N	U	M	U	R	T	U	R		Á	K	T		
R	E	U	N	Í	O	N		U	R	T	A	S	L	A	G	
O		S	N	G		A	S	F	A	L	T	F	Ó	L	K	
L	E	S			K		T	F	L		R	A	K	A		
A	N	A	T	O	L	Í	A			S	Í	L	U	R		
R	Ø	R	Í	N	Í		K	Í		P	U	T	R	A	R	
A		A	N	O	R	A	K	K		R	M			R	Ó	
F	A	T	A		R		A	R	N	O		T	O		P	
Í	N	U		G	Í	L	L	Í		Y	V	I	R		A	
S		N	R		P	O		N	Á	T	A	R	N	Í	R	
K	O	D	A		O	P		G	R	Í	L	L	A	R		
U	R	U	M		S	Í	L			M		A	R	A	L	
R	Ø	R	A		Í	N	A	R	E	Á	Í	N		N	E	
Í			L	Á	N		G	U	L	L			R	A	K	
N	Í	E	L	S		S	E	R	Í	A	N		A	R	A	
283	S	K	Á	T	T	U	R	Í	N		E	V	N	Í	R	

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn - og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ..« á bjálvan.

284

Loysunar-orðið: _____

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt